# Ein fiskivinnustevna á røttum staði



MARGFALT

*- Nýhugsan er lykilin, um vit skulu standast í altjóða kappingini, og er ein av lyklunum til ein sterkan búskap, segði Kaj Leo Johannesen, tá hann setti Fish Fair í gjár. Aftanfyri á myndini sæst Dánjal Petur Hansen, høvuðsfyriskipari*

**FISKIVINNUSTEVNA Á fyrsta sinni er Klaksvík vertur fyri North Atlantic Fish Fair. Hesaferð eru um 100 framsýnarar úr øllum heiminum við. – Tað er ikki av tilvild, at vit hava lagt ársins fiskivinnurstevnu júst í Klaksvík, sigur Dánjal Petur Hansen, høvuðsfyriskipari av stevnuni sum verður hildin í hesum døgum**

Snorri Brend

**Klaksvík:** Stóra fiskivinnustevnan hevur ment seg ár undan ári, síðani hon á fyrsta sinni varð hildin í Runavík.

Eitt arbeiði er lagt í fyrireikingina, og ikki kann sigast annað, enn at bæði føroyskar og útlendskar fyritøkur hava tikið sera væl undir við stevnuni.

Tá stevnan varð sett fyrrapartin í gjár høvdu beint niðanfyri 100 framsýnarar og vørur úr Føroyum og so fjarlagdu londum sum USA, Italia, Canada og Japan savnaði saman her.

Klaksvík verður av røttum mettur sum fiskivinnuhøvuðsstaður okkara, og hetta taldi avgjørt við, tá avgerð skuldi takast um, hvar ársins fiskivinnustevna skuldi haldast.

- At Klaksvík eisini kann bjóða bestu umstøður til eina slíka stevnu, við tveimum stórum hallum í nánd av hvørji aðrari, taldi eisini við í avgerðini, sigur Dánjal Petur Hansen.

Enn er avgerð ikki tikin um, hvar tann 6. stevnan skal haldast. Men lítil ivi man vera um, at umstøðurnar og undirtøkan í ár – ikki minst av teimum vitjandi higartil – tala fyri eini endurtøku av stevnuni í Klaksvík.

## Loysn

Fleiri av útlendsku framsýnarunum umboða merki, ið eru væl kend av føroyska fiskimanninum ella teimum ið takast við fiskivinnu á landi.

Hóast hesar umstøður, so smæddust tær føroysku fyritøkurnar, sum taldu omanfyri helmingin av framsýnarunum, á ongan hátt burtur.

Tær megnaðu eisini at vísa fram góðar og kendar vørur, umframt eisini heilt nýggjar uppfinningar.

Ein teirra er fyritøkan Green IQ úr Kollafirði, sum er komin við eini loysn uppá trupulleikarnar við olju í kjølinum umborð á skipi ella oljufilmi á landi.

Hesin lensarin er enn ikki farin í framleiðslu, tí teir í fyritøkuni í størstan mun ætlaðu at vísa hetta produktið fram, og síðani fáa staðfest, um áhugi er fyri tí.

Tá Sosialurin vitjaði á stevnuni beint eftir døgurða í gjár, kundi ein av stigtakarunum, Jóhann Fagraklett staðfesta ein stóran áhuga fyri hesi nýggju loysnini.

- Ein stórur fyrimunur við okkara uppfinning er, at hon ger tað lættari at fáa fatur á oljuni, sum flýtur oman á kjølvatninum. Fyri mangar er hetta tí ein hent uppfinning, vísir Johann á.

## Longur út

Eitt annað sjáldsamt fyribrygdi við stevnuni í ár er spurningurin, hví so mangir framsýnarar eru við í ár.

Eingin man vera í iva um, at fíggjarkreppan hevur rakt vinnulívið meint, bæði her á landi og úti í heimi. Kortini hevur tað eydnast at fáa vala lið av framsýnarum til ársins stevnu.

Hetta sama vísti eisini Gunvá við Keldu á, tá Rás2 hitti hana á framsýningini. Hon er borgarstjóri í Klaksvík, og er ein av virknu luttakarunum á stevnuni.

- Tað er ótrúligt, at tað hevur eydnast at fáa so nógvar framsýnarar higar. Men tað er kanska so, at tað júst er undir slíkum umstøðum, at fyritøkur velja at satsa uppá at røkka longur út, segði hon í samrøðuni.

Fish Fair 2011 er opin í dag og í morgin aftrat.

---

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at kæra kona, mamma og omma okkara

**Marjun Follend**
**ættað úr Vestmanna**
**búsitandi á Strondum**
**andaðist á Landssjúkrahúsinum**

týsdagin 5. apríl, 61 ára gomul.

Bønarhald verður í Landssjúkrahúskapellinum fríggjadagin kl. 17.00.
Jarðarferðin verður úr Vestmanna kirkju leygardagin kl. 13.00.

***Familjunnar vegna***
**Martin og Familja**

Tey, ið vilja minnast Marjun, kunnu lata nýggja missiónshúsinum á Strondum eina gávu, konta í peningastovnunum.

---

# Norrøna sum hotellskip

Í samband við Fish Fair verður Norrøna brúkt sum hotelskip í Klaksvík, til tess at hýsa teimum mongu framsýnarunum og útlendsku gestunum. Í hesum sambandi verður nógv gjørtur burturúr fyri tey vitjandi.

Umframt at matstovurnar umborð fara at borðreiða við øllum góðum, verður nógv gjørt burturúr tónleikinum. Eyðun Nolsøe, Hallur Joensen, Torkil Mørkøre, Flemming Petersen Band eru millum tey mongu sum fara at undirhalda.

Norröna kom á Klaksvík mánamorgunin, og fer ikki avstað aftur fyrr enn seint hóskvøldið beint fyri midnátt, so talan er um heilar fýra undirhaldandi dagar umborð.


